# KT í fólkaskúlanum sæð frá leiðslunnar síðu

Verkætlanin er gjørd av:
Olafi Magnussen
Toftum

Apríl 2001

# Innihald 2


**Inngangur** 3

**Uppgávuorðing**
**Verkevni: KT í fólkaskúlanum sæð frá leiðslunnar síðu** 4

**Lutmál 1 Fólkaskúlalógin** 6
Fólkaskúlalógin 6
Leiðbeinandi lesiætlanir fólkaskúlans 6
Støða fólkaskúlans á KT-økinum 7
Spurnarblaðs-kanning 8

**Lutmál 2 Lærarafyritreytir** 10
Lærarar og KT 11
Eftirútbúgvingarmøguleikar 12
Ivasom viðurskifti 13
Fyritreytir læraranna - niðurstøða 15

**Lutmál 3 Undirvísingarætlanir** 15
KT í fólkaskúlanum - ein námsfrøðiligur trupulleiki 16
KT-undirvísingarætlan 16
KT-ætlanir - leiðslunnar ábyrgd 17
Námsfrøðiligur tænastudepil skúlans 18
KT-undirvísingin í fólkaskúlanum 18

**Lutmál 4 Umstøður/karmar** 18
Skúlans bygnaður 18
"Plasering" av KT-útbúnaði skúlans 19
Trupulleikar viðv. umstøðum/karmum skúlans 19
Umstøður læraranna 21

**Lutmál 5 Økonomiskar fyritreytir** 21
KT í fólkaskúlanum - ein kostnaðarmikil uppgáva 21
Stuðul frá lands- og kommunalmyndugleikum 22

**Samandráttur** 22
KT í fólkaskúlanum - ein ætlan/strategi 23

**Fylgiskjal** 26
Spurnarblað (Skjal A) 26

**Keldulisti** 28

# Inngangur

Vit mugu ásanna, at leiðsla, lærarar og næmingar - ja, allur fólkaskúlin, stendur frammanfyri eini stórari avbjóðing, um fólkaskúlin í framtíðini skal verða við í tí KT-menning, sum annars er í nútíðarsamfelagnum.

Umráðandi er, at fólkaskúlin innan øll umráði, er tilreiðar at taka við teimum avbjóðingum, ið kunningarsamfelagið setur.

Tað eigur altíð at verða fólkaskúlans málsetningur at skapa tey bestu líkindi fyri, at næmingar fólkaskúlans fáa tann førning, ið er neyðugur fyri framhaldandi at mennast og búnast sum menniskju. Ein partur av hesum førningi er, at allir næmingar fólkaskúlans fáa møguleika og umstøður at menna síni evni gjøgnum KT.

At kunningartøkni gerst meir og meir ein natúrligur partur av undirvísingini, er ein sjálvsagdur lutur. Men enn vantar tó nógv í, til hesin møguleiki er eins fyri allar næmingar. Hetta kemst m.a. av, at umstøðurnar eru ymiskar frá einum skúla til annan. Skulu allir næmingar fólkaskúlans hava sama møguleika til KT í undirvísingini, er umráðandi, at avvarðandi myndugleikar og fólkaskúlin allur, síggja KT-menningina í fólkaskúlanum sum eina heild.

Í hesi verkætlanaruppgávu við verkevninum **"KT í fólkaskúlanum sæð frá leiðslunnar síðu"** verða fleiri "aktuellir" spurningar innan kunningartøkni viðgjørdir. Spurningar, ið hava serligan týdning fyri leiðslur fólkaskúlans í teirra dagliga arbeiði, men eisini fyri lærarar fólkaskúlans og teir myndugleikar, ið varða av fólkaskúlanum.

Í høvuðsmálinum til verkætlanina stendur: **Hvørja "ætlan/strategi" skulu leiðslur fólkaskúlans við atliti til fólkaskúlalóg, lærarafortreytir, undirvísingarætlanir, karmar/umstøður og økonomi, leggja, tá kunningartøkni, sambært viðmerkingunum til grein 5 í nýggju fólkaskúlalógini, skal verða ein natúrligur partur av dagligdegi skúlans, tað veri seg fakliga og námsfrøðiliga.**

Undirstrikast skal, at tað er nyttuleyst at menna fólkaskúlan á KT-økinum, um ikki hædd verður tikin fyri teimum í høvuðsmáli nevndu atlitum. At menna KT í fólkaskúlanum, er uttan iva største og mest krevjandi uppgáva í nýggjari tíð, sum avvarðandi myndugleikar, leiðslur, lærarar og næmingar hava staðið yvirfyri.

Verkætlanaruppgávan er eitt skriftligt verk og inniheldur fimm lutmál, ið eru ein partur av uppgávuorðingini. Seinast í verkinum er ein samandráttur. Fyri betur at lýsa støðu fólkaskúlans á KT-økinum, er eitt spurnarblað sent øllum leiðarum fólkaskúlans. Spurnarblaðið er lagt við sum fylgiskjal.

# Uppgávuorðing

# Verkevni: KT í fólkaskúlanum sæð frá leiðslunnar síðu

## Høvuðsmál

**Hvørja "ætlan/strategi" skulu leiðslur fólkaskúlans við atliti til fólkaskúlalóg, lærarafortreytir, undirvísingarætlanir, karmar/umstøður og økonomi, leggja, tá kunningartøkni, sambært viðmerkingunum til grein 5 í nýggju fólkaskúlalógini, skal verða ein natúrligur partur av dagligdegi skúlans, tað veri seg fakliga og námsfrøðiliga.**

## Lutmál 1 Fólkaskúlalógin

Orðið **telda** ella **teldunýtsla** er ikki beinleiðis nevnt í fólkaskúlalógini, men í viðmerkingunum til grein 5 í nýggju fólkaskúlalógini stendur m.a. at:

> - tað verður hildið neyðugt hjá fólkaskúlanum at geva tí uppvaksandi ættarliðnum holla støðisvitan um teldu og teldunýtslu…, so at tey kunnu verða før fyri at nýta telduna sum eitt hóskandi hjálparamboð í gerandisdegnum
> - teldan er eitt natúrligt hjálparamboð í tí dagligu undirvísingini í øllum lærugreinum og verkevnum, har teldunýtsla verður hildin at vera til fyrimunar fyri uppgávuloysnina
> - við teimum samskiftis- og upplýsingarmøguleikum, teldan hevur, eru og verða frálíkir møguleikar at fjølskipa, fjølgreina og dagføra undirvísingina, og um rætt verður atborið, so kann teldunýtslan samstundis vera ein kveikjandi birtari, ið fremur menning og framgongd innan skúlagátt

**Eitt er, hvat ið fólkaskúlalógin við viðmerkingum sigur; men megna leiðslur skúlans at uppfylla lógina við tess krøvum viðvíkjandi kunningartøkni?**

**Hava lands- og kommunalmyndugleikarnir gjørt sær greitt, hvørjar økonomiskar avleiðingar tað kemur at hava fyri fólkaskúlan, um lógin við tess viðmerkingum skal haldast?**

## Lutmál 2 Lærarafyritreytir

Í viðmerkingunum til fólkaskúlalógina stendur m.a. nakað soleiðis:

> - at teldan er eitt natúrligt hjálparamboð í tí dagligu undirvísingini í øllum lærugreinum og verkevnum…

Tað er tí av alstórum týdningi, at allir lærarar fólkaskúlans regluliga fáa møguleika at eftirútbúgva seg innan kunningartøkni.

**Spurningurin til leiðslurnar er tí, hvussu kunnu vit síggja til, at henda eftirútbúgving verður nýtt á ein skinsaman hátt í tí dagligu undirvísingini, og**

**hvussu kunnu vit virka við til, at teir lærarar, ið serliga hava áhuga at arbeiða við kunningartøkni, fáa møguleika til tess?**

## Lutmál 3 Undirvísingarætlanir

Allir fólkaskúlar hava óivað sínar undirvísingarætlanir fyri hvønn einstakan skúla og flokk. Hvussu kunnu vit tryggja okkum, at:

- **KT verður ein sjálvsagdur/ "integreraður" partur av áðurnevndu undirvísingarætlanum skúlans**
- **KT verður ein heilt natúrligur partur bæði fyri lærarar og næmingar**

## Lutmál 4 Umstøður/karmar

Skal teldan verða eitt natúrligt amboð í fólkaskúlanum og í gerandisdegnum so er neyðugt, at skúlin er við í tí KT-menning, ið nútíðarsamfelagið er fyri.

**Umráðandi er, at leiðslur fólkaskúlans arbeiða fyri, at skúlarnir fáa umstøður/karmar, ið virka við til, at verulig gongd kemur á KT-menningina í fólkaskúlanum.**

## Lutmál 5 Økonomiskar fyritreytir

Ein avgerandi fyritreyt fyri at hava ein væl útgjørdan KT-útbúnað er, at økonomisku fyritreytirnar er í lagi.

**Menningin á KT-økinum er ein sera kostnaðarmikil postur. Hvussu kunnu leiðslur fólkaskúlans virka fyri, at tann peningur/stuðul, ið veittur verður til framkomna teldu- og samskiftisútgerð, verður brúktur á ein skynsaman og mennandi hátt í fólkaskúlanum, næmingum og lærarum at gagni?**

# KT í fólkaskúlanum sæð frá leiðslunnar síðu

## Lutmál 1 *Fólkaskúlalógin*

**Fólkaskúlalógin**

Í nýggju fólkaskúlalógini, ið allir føroyskir fólkaskúlar virka eftir, og sum kom í gildi 1. august í 1998, er ikki nógv at finna um kunningartøkni - stytt KT.
Sjálvt um hugt verður eftir øllum lógargreinum í fólkaskúlalógini, so eru orðini kunningartøkni, telda ella teldunýtsla ikki beinleiðis nevnd. Vit eru tí í tí løgnu støðu, at møguliga størstu og mest víðfevndu krøv til føroyska fólkaskúlan í nýggjari tíð, eru at finna í viðmerkingunum til fólkaskúlalógina.
Í grein 5 í fólkaskúlalógini stendur m.a. at: *"Undirvísingarinnihaldið skal vera valt og skipað soleiðis, at næmingarnir fáa líkindi at nema sær fakliga djúphugsan, høpi og heild. Í undirvísingini skulu næmingarnir hava høvi at ogna sær sannkenning og teir arbeiðshættir, ið eyðkenna einstøku lærugreinina…"*

Í viðmerkingunum til lógargrein 5 framgongur millum annað, at

- tað verður hildið neyðugt, at geva tí uppvaksandi ættarliðinum holla støðisvitan um teldu og teldunýtslu, so at tey kunnu verða før fyri at nýta telduna sum hóskandi hjálparamboð í gerandisdegnum
- teldan eigur við sínum øktu møguleikum at gerast eitt natúrligt hjálparamboð í dagligu undirvísingini í teimum lærugreinum og verkevnum, har teldunýtsla verður hildin at vera til fyrimunar fyri uppgávuloysnina
- við teim samskiftis- og upplýsingarmøguleikum, teldan hevur, eru og verða frálíkir møguleikar at fjølskipa, fjølgreina og at dagføra undirvísingina, og um rætt verður atborið, so kann teldunýtslan samstundis verða ein kveikjandi birtari, ið fremur menning og framgongd innan skúlagátt.

Sambært viðmerkingunum til grein 5 í nýggju fólkaskúlalógini kann tað ikki skiljast øðrvísi enn, at kunningartøkni eigur at verða ein heilt natúrligur/sjálvsagdur partur av dagligdegi fólkaskúlans, tað veri seg fakliga og námsfrøðiliga.

**Leiðbeinandi lesiætlanir fólkaskúlans**

Í ávikavist 1990 og 1993 komu bøkurnar "Fólkaskúlin, undirvísingarleiðbeining, almennur partur" og "Fólkaskúlin, leiðbeinandi lesiætlan, yrkisligur partur".
Í almenna partinum av undirvísingarleiðbeining fólkaskúlans stendur m.a. viðv. kunningartøkni, at: "skúlin eigur at geva næmingunum grundleggjandi kunnleika um teldutøkni og at teldan eigur at vera eitt vanligt hjálpartól í øllum lærugreinum". (s. 105)
Í yrkisliga partinum av leiðbeinandi lesiætlan fólkaskúlans er ein partur, sum viðgerð telduna í undirvísingini. Har stendur nakað soleiðis: "Teldan er vorðin vanlig bæði í heimi og samfelagi, og at tað verða fleiri og fleiri uppgávur, ið teldan og teldufólk fara at taka sær av í framtíðini. Tað er tí umráðandi hjá fólkaskúlanum at geva tí uppvaksandi ættarliðinum holla støðisvitan um teldu og teldunýtslu, so at tey kunnu verða før fyri at nýta telduna sum eitt hóskandi hjálparamboð í gerandisdegnum. Tí er tað umráðandi at teldan gerst eitt natúrligt hjálparamboð í dagligu undirvísingini…" (s.337-345)
Samanumtikið kann tí sigast, at formligu karmarnir viðv. kunningartøkni í undirvísingini í fólkaskúlanum eru í lagi. Sambært nýggju fólkaskúlalógini og

galdandi lesiætlanum, er onki til hindurs fyri, at føroyski fólkaskúlin kann menna seg á KT-økinum, soleiðis at KT verður ein natúrligur/sjálvsagdur "integreraður" partur í øllum lærugreinum og verkevnum fólkaskúlans.

**<u>Støða fólkaskúlans á KT-økinum</u>**

Støðan viðv. kunningartøkni í fólkaskúlanum, er rættiliga nógv øðrvísi í dag, enn fyri árum síðan, tá fyrstu teldurnar komu inn í fólkaskúlan. Fyri 10-15 árum síðan vóru tað bert heilt fáir skúlar, ið yvirhøvur høvdu teldur, og teir fáu lærarar, ið hættaðu sær at gera royndir við kunningartøkni í undirvísingarhøpi, vóru oftast lærarar við serligum áhuga fyri hesum ókenda undirvísingarmiðli, og sum vóru tilreiðar at nýta bæði orku og tíð til at kunna seg um teir fjølbroyttu møguleikar, ið henda nýggja tøknin hevði við sær.
Fyrstu tíðina var tað sum oftast ein spurningur, um fíggjarlig orka var til keyp av KT-útbúnaði ella ikki, og um tað á teimum einstøku skúlunum funnust lærarar við serligum áhuga ella kunnleika til teldur, og sum yvirfyri leiðslum skúlans megnaðu at grundgeva fyri sínum sjónarmiðum viðv. týdninginum at fylgja við í menningini innan kunningartøkni.

**KT-støðan í dag**

Sum áður sagt, er støðan heilt øðrvísi í dag. Fleiri og fleiri skúlaleiðarar og fólkaskúlalærarar hava seinnu árini broytt hugburð viðv. spurninginum um nýtslu av kunningartøkni í skúlanum. Frá at hava havt ein ivasaman hugburð til kunningartøkni sum heild, so eru stórar broytingar hendar seinnu árini. Orsøkin til hesar hugburðsbroytingar eru óiva fleiri, men størsta orsøkin er helst tann, at vit hava fingið eitt øðrvísi samfelag - eitt sokallað kunningar-samfelag, ið setur stór krøv til okkum menniskju, og eru vit ikki tilreiðar at taka við teimum avbjóðingum, ið kunningar-samfelagið setur, so verða vit afturúrsigld í mun til onnur fólk, sum vit í framtíðini skulu samskifta og samstarva við.
Ein natúrlig fylgja av teimum samfelagsbroytingum, ið hava verið og dagliga eru á kunningartøkniliga økinum, eru lógarbroytingar og tillagingar annars. Eisini fólkaskúlalógin vit tess viðmerkingum, er vorðin broytt og tillagað áðurnevndu samfelagsbroytingum.
Í viðmerkingunum til grein 5 í nýggju fólkaskúlalógini, finna vit eina aðra orsøk til broyttan hugburð hjá leiðslum og lærarum viðv. kunningartøkni í fólkaskúlanum. Út frá viðmerkingunum til áðurnevndu grein, kann tað ikki skiljast øðrvísi, enn at kunningartøkni eigur at verða ein heilt natúrligur/sjálvsagdur "integreraður" partur í øllum lærugreinum og verkevnum fólkaskúlans.
Umframt lesiætlanir fólkaskúlans "Fólkaskúlin, undirvísingarleiðbeining, almennur partur" og "Fólkaskúlin, leiðbeinandi lesiætlan, yrkisligur partur", hava allir skúlar sína lokalu lesiætlan. Í lokalu lesiætlanini eigur kunningartøknin at verða viðgjørd - ikki neyðturviliga sum ein serstøk lærugrein, men sum eitt úrslit av eini tilgongd, ið leiðsla og lærarar skúlans í felagi hava evnað, og sum útførliga viðgerð tey hugtøk innan kunningartøknina, ið eru neyðug, fyri at KT kann gerast ein natúrligur partur av undirvísingini. Á sama hátt eigur kunningartøknin at vera ein sjálvsagdur partur av ársætlanum skúlans fyri hvønn einstakan flokk.
Á fíggjarliga økinum er støðan eisini nógv broytt seinnu árini. Tann fíggjarligi spurningurin er í flestu førum ikki nakar trupulleiki fyri, at kommunur og skúlar kunnu menna KT-útbúnaðin, sum líkur tey krøv, ið kunningarsamfelagið setur. Fyri at lætta um fíggjarliga partin hjá kommununum og fyri at fáa gongd á KT-menningina í skúlunum, hava allar kommunur í einum tvey ára skeiði fram til endan av 2000, fingið

tilboð um fíggjarligan stuðul frá MMS. Hesin stuðul verður latin eftir ávísum reglum, og er til teldukeyp.
Tá talan er um fyritreytir læraranna, so er eisini nógv broytt seinnu árini. Frá at hava brúkt bæði orku og tíð til at fáa ein sjálvlærdan kunnleika innan kunningartøkni, so er støðan øðrvísi í dag. Nú hava allir lærarar tilboð um at taka "KT-kort fólkaskúlans", ið KT-depilin skipar fyri, umframt onnur størri og smærri skeið, ið LMS og MMS skipa fyri.
KT-depilin hevur eisini tikið sær av at útbúgva bæði KT-vegleiðarar og KT-vørðir, ið skulu virka við til, at kunningartøknin bæði tøkniliga og námsfrøðiliga verður ment í fólkaskúlanum.

**<u>Spurnarblaðs-kanning</u>**

Í februar 2001 fingu allar leiðslur fólkaskúlans eitt spurnarblað við spurningum, sum geva eina mynd av, hvussu støðan er í dag viðv. kunningartøkni í fólkaskúlanum. Somuleiðis gevur kanningin ábendingar um framtíðarútlit fólkaskúlans á KT-økinum. (Skjal A).
Av øllum skúlaleiðarum, ið fingu spurnarblaðið sendandi, hava 25 skúlaleiðarar vegna teirra skúlar svarað spurnarblaðnum. Hetta er ikki nakað stórt tal, men nevnast skal, at allar skúlastøddir eru umboðaðar. Viðmerkjast skal, at tað eru serliga teir stóru og miðalstóru skúlarnir, ið hava givið til kennar, hvussu støða teirra er viðv. kunningartøkni, meðan teir smærru bygdarskúlarnir í lítlan mun hava svarað spurnarblaðnum.

**Úrslit av spurnarblaðs-kanningini**

Av teirri orsøk, at talið av teimum, ið hava svarað spurningunum ikki er størri enn tað er, er tað trupult at siga nakað "generelt" um, hvussu samlaða støðan er í føroyska fólkaskúlunum. Tó vil eg meta, at tað við størsta varsemi er gjørligt at síggja eitt mynstur, sum kann lýsa KT-menningina í fólkaskúlanum.
Niðanfyri er ein samandráttur av svaraðu spurnarbløðunum, og sum gevur nakrar varligar ábendingar um, hvussu støða fólkaskúlans er á KT-økinum í dag.

- Flestu skúlar hava ment tann tøkniliga partin. T.v.s, at tann tøkniliga síðan ikki er nøkur beinleiðis forðing fyri KT-menningini í fólkaskúlanum.
- Rættiliga nógvar kommunur hava fingið fíggjarligan stuðul frá MMS til teldukeyp.
- Flestu kommunur hava sæð týdningin av at stuðla skúlum teirra á KT-økinum. Hesin stuðul fer aloftast til tað tøkniliga umráðið og til keyp av undirvísingarforritum, meðan so at siga ongar stuðulskipanir eru galdandi fyri menning av lærarum skúlans á KT-økinum.
- Tað er rættiliga ymist frá skúla til skúla, tá talan er um, hvussu nógvir næmingar eru til hvørja teldu. Úr 3 upp til 15 næmingar; men flestu leiðarar siga, at talið liggur millum 5 og 10.
- Rættiliga nógvir skúlar hava fingið samband við internetið; men tað er ymist, hvat samband talan er um. Tað eru serliga teir stóru framhaldsskúlarnir, ið hava opið/fast samband, meðan teir meðalstóru barnaskúlarnir hava uppringt ISDN-samband. Tað sýnist sum, at teir smáu bygdarskúlarnir við nøkrum fáum næmingum hava uppringt ella als onki samband við internetið.
- Viðv. spurninginum um, hvussu teldurnar eru "plaseraðar", er talan um eitt týðiligt mynstur. Í flestu skúlum standa teldurnar í einum ella tveimum telduhølum, og eru knýttar saman í eitt net við einum ambætara. Eisini eru tað

rættiliga nógvir skúlar, sum hava teldur við internet-sambandi á bókasavninum. Somuleiðis eru tað aðrir skúlar, ið hava eina til tvær teldur standandi inni í ávísum flokshølum og serhølum. Hesar síðstnevndu teldurnar hava ofta einki net- ella internet-samband.

- Tá talan er um, hvussu atgongdin er til KT-útbúnað skúlans, er eisini eitt greitt mynstur. So at siga allir skúlar loyva ikki næmingum til teldurnar, uttan at lærari er saman við teimum. T.v.s, at næmingarnir ikki hava fría atgongd til teldur skúlans í skúlatíðini. Mynstrið er tað sama viðv. atgongdini eftir skúlatíð. Tó skal nevnast, at nakrir fáir skúlar hava bókasavn, ið loyva næmingum skúlans atgongd til ávísar teldur bæði í og eftir skúlatíð.
- Svar leiðaranna er greitt viðv. spurninginum um fyritreytir lærarann í føroyska skúlanum. Flestu lærarar hava tikið KT-kort fólkaskúlans. Øðrvísi er tað viðv. spurninginum, um lærarar gera brúk av teimum skeiðsmøguleikum, ið eru, og um tað yvirhøvur er nóg mikið av eftirútbúgvingarmøguleikum á KT- økinum. Nakrir skúlaleiðarar siga, at flestu lærarar gera brúk av teimum skeiðsmøguleikum, ið eru, meðan aðrir siga, at talan er um nakrar ávísar lærarar, ið gera brúk av hesum møguleika. Ein stór helvt av spurdu skúlaleiðarunum meta, at tað eru nóg mikið av eftirútbúgvingarmøguleikum, meðan aðrir siga, at ov fá tilboð eru til lærarar á hesum øki. So eru tað aftur nakrir, ið ikki vita hvørjir eftirútbúgvingarmøguleikar eru.
- Næstan allir skúlaleiðarar siga, at ongar lokalar kommunalar KT-ætlanir finnast, ið hava til endamáls at stuðla og menna fólkaskúlan viðv. kunningartøkni.
- Í framhaldsskúlunum verður KT-undirvísingin aloftast skipað sum ein serstøk vallærugrein, nevnd teldulæra, og annars sum ein natúrligur partur av undirvísingini. Í teimum smærru skúlunum siga leiðararnir, at KT-undirvísingin er ein natúrligur partur av undirvísingini. Bert einstakir skúlar gera brúk av styttri undirvísingarskeiðum.
- Stórur partur av leiðarum skúlans siga, at tað er uppgávan hjá øllum lærarum fólkaskúlans at taka sær av KT-undirvísingini. Nakrir geva til kennar, at talan er um eina flokslærara-uppgávu, meðan nakrir fáir siga, at talan er um eina deilda uppgávu millum ávísar lærarar og KT-vegleiðara/KT-vørð skúlans.
- Tá talan er um lokalu lesiætlanir fólkaskúlans á kunningartøkniliga økinum, ið hava eitt mál og eina ætlan/strategi, hvussu KT kann gerast ein heilt natúrligur partur av øllum lærugreinum og verkevnum, er støðan tann, at nakrir fáir skúlar hava nøkur "yvirornaði" punkt, ið er teirra KT-mál og ætlan. Fleiri skúlar hava als onki mál og tí onga ætlan/strategi, meðan nakrir skúlar hava ætlanir um at gera eina. Tað er vert at nevna, at einans ein skúlaleiðari sigur, at á teirra skúla finst ein skriftlig KT-undirvísingarætlan.

Høvuðsendamálið viðv. kunningartøkni í fólkaskúlanum er heilt greitt og kann ikki misskiljast. Kunningartøkni eigur at verða ein "integreraður" partur av øllum lærugreinum og verkevnum. Somuleiðis eigur endamálið fyri kunningartøkni at vera tillagað soleiðis, at tað "harmonerar" við alla fólkaskúlalógina.
Sum áður sagt, er endamálið greitt; men skal fólkaskúlin megna at uppfylla lógina við tess viðmerkingum, so eigur høvuðsendamál fólkaskúlans viðv. kunningartøkni at vísa seg sum ítøkilig mál og ætlanir fyri teir einstøku skúlarnar í landinum. Somuleiðis eiga teir kommunalu myndugleikarnir at kunnast um, at tað er alneyðugt, at kommunurnar hava eitt greitt mál og ætlanir á KT-økinum.

Ein væleydnað "integratión" av kunningartøkni í fólkaskúlanum, sum fólkaskúlalógin við viðmerkingum leggur upp til, er ein stór avbjóðing fyri lærarar og leiðslur. Ein avbjóðing, ið er treytað av at fleiri tættir ganga saman í eina hægri eind. Hesir tættir eru fyrst og fremst:

- fólkaskúlalógin við tess viðmerkingum
- støða lands- og kommunalmyndugleikanna til kunningartøkni
- lærarafyritreytir
- mál og lesiætlanir
- umstøður og karmar
- økonomiskar fyritreytir

Í innganginum til KT-álitið, "Kunningartøkni í fólkaskúlanum", verður sagt, at "avgerðin um, at Føroyar skulu vera eitt kunningar-samfelag, er tikin. Tað, sum nú ræður um, er: Hvussu nýta vit møguleikarnar, sum liggja í kunningartøknini – skúlanum og samfelagnum at gagni?"
Til eina og hvørja tíð er tað fólkaskúlans uppgáva, eins væl og ein lokal- og landspolitisk uppgáva, at kunna seg um, hvørjar kostnaðarligar avleiðingar tað hevur fyri land og kommunur og teir einstøku skúlarnar, um ætlanin er, at fólkaskúlin framhaldandi skal verða ein partur av kunningarsamfelagnum.
Undirstrikast skal, at tað ikki á nakran hátt kann rættvísgerast at koma við lógum og reglugerðum viðv. kunningartøkni í fólkaskúlanum, uttan at lands- og kommunalmyndugleikar eru vorðnir greiðir yvir, hvat ið skal til fyri at gjøgnumføra eina sunna KT-menning í fólkaskúlanum. Myndugleikarnir eiga til eina og hvørja tíð at hava í huga, at umstøðurnar kring landið eru sera ymiskar við atliti til økonomiskar fyritreytir, fysiskar karmar og umstøður. *Ein* skúli, kann hava fíggjarligar góðar møguleikar at menna kunningartøkniliga partin, meðan grannaskúlin als ongar møguleikar hevur. Tað velst eisini um, hvussu kommunalpolitikkarar síggja tørvin viðv. spurninginum at menna fólkaskúlan á KT-økinum.

## Lutmál 2 *Lærarafyritreytir*

Verður hugt eftir viðmerkingunum til fólkaskúlalógina viðv. kunningartøkni í fólkaskúlanum, so mugu vit ásanna, at tað hvílir ein ógvuliga stór og tung uppgáva á leiðslum og lærarum fólkaskúlans. Og skulu leiðslur og lærarar fólkaskúlans megna at nýta KT sum eitt vanligt hjálparamboð í undirvísingini, og geva øllum næmingum fólkaskúlans eina holla støðisvitan um teldu og teldunýtslu o.s.fr., so er umráðandi, at bæði leiðslur og lærarar hava tær fyritreytir innan kunningartøkni, ið eru neyðugar.
Bæði leiðslur og lærarar fólkaskúlans eru vitandi um, at føroyski fólkaskúlin er í eini broytingartíð. Fólkaskúlin er ein partur av tí KT-menning, ið samfelagið - eisini nevnt kunningarsamfelagið - er í. Fleiri og fleiri skúlar hava seinnu árini ment KT-útbúnaðin og eisini tann partin, ið fevnir um undirvísingarforrit. Men vit mugu tó ásanna, at ein tilsvarandi menning av KT-vitanini hjá leiðslum og lærarum fólkaskúlans ikki er nøktandi.
Ein týðandi táttur fyri at fáa eina góða og fjøltáttaða menning innan kunningartøkni í fólkaskúlanum, er støða lands- og kommunalmyndugleikanna, leiðslunnar og læraranna til KT og til teir møguleikar sum liggja í kunningartøkni - skúlanum og samfelagnum at gagni.

**Lærarar og KT**

Í eini rapport, nevnd "IKT i folkeskolen. Lærernes behov for efteruddannelse", ið er eitt úrslit av eini kanning av donskum skúlaleiðarum og lærarum, sum Oxford Research A/S í samarbeiði við Gallup gjørdi í september 1999 fyri Center for Teknologistøttet Udannelse (CTU), kemur sera nógv áhugavert fram.
Áðurnevnda kanning er grundað á eitt spurnarblað, ið varð latið fólkaskúlalærarum og fólkaskúlaleiðarum, og byggir á teirra metingar um kunningartøkni í fólkaskúlanum.
Kanningin vísir m.a, at fólkaskúlalærarar sum heild eru positivir og tí eisini sinnaðir at nýta kunningartøkni í undirvísingini. Teir vísa á, at kunningartøkni er m.a. við til at stuðla teimum veiku næmingunum og gevur góðar møguleikar fyri, at næmingarnir við teirra ymiskleika og sermerktu áhugamálum kunnu menna seg, við tað at teir fáa nýtt síni evni og kreativitet øðrvísi enn áður. Somuleiðis siga teir, at við hjálp av KT, kann undirvísingin í nógv størri mun verða næmingalagað og meira "verkætlanar-skipað". Men støðan er tann, at ein rættiliga stórur partur av teimum donsku lærarunum hava ikki dirvið til at taka við tí avbjóðing, tað er at nýta KT í teirra dagliga arbeiði í skúlanum vegna vantandi KT-førleikar. Í kanningini verða lærararnir deildir í tríggjar bólkar:

**"Frontløberne"**, ið meta, at teir eru væl fyri bæði tøkniliga og námsfrøðiliga at nýta kunningartøkni í undirvísingini. Til henda bólk hoyra 19 prosent av lærarunum.

**"Mellemgruppen"**, sum í ein ávísan mun meta, at teir tøkniliga og námsfrøðiliga eru førir fyri at nýta kunningartøkni í undirvísingini. Til henda bólk hoyra 16 prosent av lærarunum.

**"Nybegyndere"** ið klárt geva til kennar, at teir mangla grundleggjandi tøkniligar og námsfrøðiligar førleikar innan kunningartøkni, og tí ikki eru tilreiðar at nýta KT í teirra undirvísing. Til henda bólk hoyra næstan tveir triðingar av lærarunum.

Tað er sera stórur munur á, hvussu ofta teir lærarar, ið svaraðu, nýta KT í undirvísingini. Smá 40% siga, at teir nýta KT minst eina ferð um vikuna, meðan restin av lærarunum søgdu, at teir nýttu KT sjáldnari í undirvísingini. Kanningin vísir eisini, at tað er stórur munur á, hvussu nógv KT verður nýtt í teimum ymisku lærugreinunum.
Somuleiðis vísir kanningin, at sjálvt um reiðiliga tveir triðingar av teimum, ið svaraðu, hava luttikið á KT-skeiðum seinastu tvey árini, so er tað eitt áhaldandi trýst á myndugleikarnar, við ynski um, at fáa fleiri eftirútbúgvingarmøguleikar innan kunningartøkni. Hesi eftirútbúgvingarynski eru bæði innan tøkniliga og námsfrøðiliga umráðið. Nevnast kunnu: KT-førleikar innan faklig forrit, e-mail og nýtsla av interneti, tekstviðgerð og onnur arbeiðsforrit og ikki minst teir didaktisku og námsfrøðiligu spurningar viðvíkjandi nýtslu av kunningartøkni í fólkaskúlanum.
Henda kanning vísir greitt, at lærarar meta, at tann námsfrøðiligi parturin á ongan hátt eigur at verða undirmettur, men er av alstórum týdningi, tá talan er um KT-nýtslu í fólkaskúlanum, og at stórur dentur eigur at leggjast á henda partin í teimum eftirútbúgvingarmøguleikum, sum standa lærarum fólkaskúlans í boði.
Kanningin millum danskar skúlaleiðararar vísir eisini greitt, at ein helvt av donsku fólkaskúlunum og kommununum hava onga gjøgnumførda skriftliga KT-ætlan ella strategi. Tað er tí ein stór uppgáva hjá skúla- og kommunum at evna KT-ætlanir, ið m.a. handla um KT-førleikar lærarana, eftirútbúgvingarmøguleikar og um hvussu kunnigartøkni natúrliga kann "integrerast" í allar lærugreinir fólkaskúlans.

**<u>Eftirútbúgvingarmøguleikar</u>**

Tá talan er um eftirútbúgvingarmøguleikar innan kunningartøkni hjá lærarum fólkaskúlans, er støða landsmyndugleikanna, leiðslunnar og læraranna til kunningartøkni og nýtslu av kunningartøkni í undirvísingarhøpi av alstórum týdningi.

Her er umráðandi, at allir partar megna at taka við teimum avbjóðingum, ið kunningartøknin og kunningarsamfelagið setur fólkaskúlanum.

Skúlin skal kunna geva øllum næmingum møguleika at kunna seg við teldur og teldunýtslu. Men uppgáva skúlans er ikki einans at veita kunnleika. Uppgáva skúlans er eisini uppalandi, og tá talan er um kunningartøkni, so eigur skúlin at læra næmingarnar at síggja alla ta stóru nøgdina av upplýsingum, sum teir fáa, í einum kritiskum ljósi.

Um vit fara nøkur ár aftur í tíðina, so vóru tað ikki nógvir lærarar, ið høvdu kunnleika til KT, og sum nýttu KT í undirvísingini. Í dag er støðan øðrvísi. Allir lærarar fólkaskúlans hava tikið ella eru í holt við at taka "KT-kort fólkaskúlans", og flestu skúlar hava fingið nýggjan telduútbúnað, ið gevur lærarum skúlans møguleika at menna seg, so at teir kunnu gera nýtslu av KT í undirvísingini.

Eisini verða størri og smærri skeið fyriskipaði av MMS og LMS. Hesi skeið eru av alstórum týdningi og virka við til at økja um førleikar læraranna og um teirra "kompetancu" á KT-økinum.

**KT-kort fólkaskúlans**

Í sambandi við at nýggja fólkaskúlalógin varð sett í verk 1. august 1998, gjørdi táverandi landsstýrismaður í undirvísingarmálum av, at telduskeið, frá skúlaárinum 98/99 av, skuldi standa øllum fólkaskúlalærarum í boði. Hesi skeið skuldu verða hildin í undirvísingartíðini.

Skeiðini hava verið og vera hildin á skúlunum kring landið, soleiðis at allir lærarar á teimum einstøku skúlunum hava tikið skeiðið samstundis. Á smáplássum hava skeiðini verið og vera skipað sum felagsskeið fyri nakrar skúlar hvørja ferð. Skeiðið verður nevnt "KT-Kort fólkaskúlans". Tað er KT-depilin, ið leggur skeiðini til rættis og skipar vav og innihald.

Hetta skeið, er eitt grundskeið, sum m.a. hevur til endamáls, at menna hin einstaka læraran í at gera royndir, at draga ymsu kunningartøkniligu greinirnar inn í undirvísingina.

"KT-kort fólkaskúlans" er bert byrjanin. Teir lærarar, ið hava tikið KT-kort fólkaskúlans, hava einans sett spónin í greytin. Tað verður tí framhaldandi av størsta týdningi, at hin einstaki lærarin fær neyðug eftirútbúgvingar-tilboð, soleiðis, at hann kann gagnnýta teir møguleikar í liggja í kunningartøknini. Hetta kann gerast við regluliga at skipa fyri størri og smærri skeiðum, ið eru verklig/tøknilig og námsfrøðilig/didaktisk.

**KT-vegleiðarar**

Til at undirvísa lærarum fólkaskúlans í "KT-korti fólkaskúlans", eru nakrir KT-vegleiðarar vorðnir útbúnir. Hesir KT-vegleiðarar eru fólkaskúlalærarar, ið Mentamálastýrið hevur víst á, og sum frammanundan høvdu ávísan teldurførleika.

Fyri betur at kunna undirvísa fólkaskúlalærarum í "KT-korti fólkaskúlans", hava hesir KT-vegleiðararar, ið koma úr stórt sæð øllum landinum, verið ígjøgnum eitt skeið, ið ger teir førar fyri at undirvísa, bæði tann tøkniliga og tann námsfrøðiliga partin, ið skeiðið fatar um.

**KT-vørðir**

Í løtuni eru uml 20 KT-vørðir, ið eru undir útbúgving og sum verða lidnir í apríl-mai 2001. "Endamálið við hesi útbúgving er, at KT-vørðurin skal kunna røkja teldur og netskipan skúlans, leiðbeina lærarum, næmingum og leiðslu skúlans í tøkniligum og undirvísingarligum spurningum, innan kunningartøkni".

Ætlanin er sum sagt, at hesir KT-vørðir skulu røkja KT-útbúnaðin, herundir netskipanir, í teimum føroysku fólkaskúlunum; men ein partur av uppgávuni hjá telduvørðinum er eisini at leiðbeina, og eigur henda uppgáva ikki á nakran hátt at undirmetast. Er talan um at leiðbeina leiðslum og lærarum skúlans, hvat ið tað vónandi er og verður, so er talan um eitt arbeiðsumráði, ið krevur nógva tíð og orku hjá KT-vørðinum. Ein stórur partur av hesum leiðbeinandi virksemi, ið KT-vørðurin kemur at taka sær av, verður uttan iva so mikið stórt, tá hugsað verður um ta menning, ið er á KT-økinum, at tað kann verða torført at gera mun á, hvat ið er leiðbeining ella skeiðvirksemi.

**<u>Ivasom viðurskifti</u>**

Tá talan er um, at kunningartøkni skal vera ein natúrligur partur í allari undirvísing í fólkaskúlunum, og um fyritreytir læraranna í tí sambandi, so slepst ikki undan, at bæði lærarar og leiðarar fólkaskúlans mangan føla seg ótryggar, og sita við nógvum ósvaraðum spurningum.

Á sama hátt er tað ørkymlandi, tá viðurskiftini viðv. teldu-vegleiðarum og KT-vørðum, ikki eru avkláraði. Her er talan um tveir bólkar av lærarum, sum í teirra dagliga arbeiði og útbúgving hava brúkt nógva orku og tíð til at ogna sær vitan og KT-førleikar, ið gevur teimum eina "kompetancu" innan kunningartøkni, ið allur fólkaskúlin eigur fáa gagn av. Tað er tí av alstórum týdningi, at fáa ein dialog um teir spurningar, ið kunnu virka við til at fáa skipaði viðurskifti á økinum.

Sum áður nevnt, so verða skjótt uml. 20 KT-vørðir útbúnir. Hetta er ikki nakað stórt tal, tá havt verður í huga, at hesir KT-vørðir skulu røkja KT-útbúnaðin herundir netskipanir í teimum føroysku fólkaskúlunum, og leiðbeina bæði leiðslum og lærarum fólkaskúlans. Eitt er, hvat ið endamálið sigur, men hvussu er í grundini ætlanin, at skipanin skal virka í fólkaskúlanum.

Fyri betur at fáa lýst omanfyri nevndu ivasomu viðurskifti, havi eg í skrivi vent mær til KT-depilin og til MMS við ymsum spurningum, ið eru neyðugir at fáa eitt orðaskifti um, og sum kunnu verða til gagns fyri allar partar í framtíðini. Spurningarnir eru hesir:

1) Hvussu er støðan viðv. eftirútbúgvingarmøguleikum innan kunningartøkni í Føroyum, og hvørji stig eru ella verða tikin viðv. eftirútbúgving av lærarum?
2) Hvør skal taka sær av teimum KT-skeiðum, ið verða fyriskipaði í framtíðini. Verður tað LMS, MMS, KT-depilin, KT-vegleiðararar, KT-vørðir ella onnur?
3) Hava myndugleikarnir gjørt sær greitt, hvørji sløg av eftirútbúgvingum, tørvur er á hjá lærarum?
4) Hvussu verða eftirútbúgvingarskeiðini fyriskipaði í framtíðini?
5) Nakrir lærarar hava fingið útbúgving sum KT-vegleiðarar. Sum orðið sigur, so eru teir undirvísarar ella vegleiðarar til "KT-kort fólkaskúlans". Eru tað aðrar uppgávur, ið eru knýttar til KT-vegleiðararnar, ella er talan um eina avmarkaða uppgáva, ið er liðug, tá allir lærarar fólkaskúlans hava fingið "KT-kort fólkaskúlans"?
6) Tað hevur ljóðað, at teir KT-vørðir, ið verða lidnir til várs, skulu taka sær av fleiri skúlum ella ávísum skúlaøki. Er hetta ætlanin? Hvussu hava MMS og KT-

depilin hugsað sær, at henda uppgáva skal loysast - bæði verkliga og eisini kostnaðarliga?

7) Sum støðan er í løtuni, so fáa KT-vørðirnir niðurskurð fyri sítt arbeiði. Kann tað hugsast, at leiðslur skúlans í framtíðini kunnu áleggja teimum lokalt at skipa fyri ymsum skeiðvirksemi?

**ad 1-4:**

Fyri framhaldandi at menna læraran í nýtsluni av KT, so verður neyðugt við skeiðum. Her verður hugsað um bæði verklig og námsfrøðilig skeið, hvussu KT kann nýtast í undirvísingini, í ávísari lærugrein ella verkætlan.

Um sjálva skipanina av skeiðum er at siga, at størri skeið, ið krevja at lærarar skulu hava farloyvi, eiga at verða fyriskipað av eftirútbúgvingini í MMS, so sum umsitingarreglurnar siga; meðan styttru skeiðini kunnu verða skipað í einum samstarvi millum KT-depilin, skúla og LMS.

Tað er ikki avgjørt, hvar skeiðini skulu vera, og hvussu tey skulu skipast; men nógv skeið kunnu við stórum fyrimuni liggja á tí skúla ella skúlaøki, har skeiðsluttakararnir dagliga starvast. Tað er tó ikki ætlanin at KT-vørðir skulu vera einsamallir um eftirútbúgvingaruppgávuna. KT-vørðir verða útbúnir at røkja teldur og netskipan skúlans, leiðbeina lærarum, næmingum og leiðslu skúlans o.s.fr. Teir fáa úr at gera við at røkja hesar uppgávur. (KT-depilin)

**ad 5:**

Av KT-deplinum verður upplýst, at frá fyrstan tíð av, hava KT-vegleiðararnir eina avmarkaða uppgávu, sum er liðug, tá allir lærarar fólkaskúlans hava tikið KT-kort fólkaskúlans. Hesir KT-vegleiðarar hava hetta tíðarskeiðið uppbygt ein KT-førleika, ið ger teir væl egnaðar at undirvísa lærarum fólkaskúlans innan kunningartøkni. Fyri at gagnnýta hesar KT-førleikar, hevur KT-depilin vent sær til áðurnevndu KT-vegleiðarar við fyrispurningi, um teir eru áhugaðir at skipa fyri smærri eftirútbúgvingar-skeiðum fyri teirra starvsfelagum á teirra skúla ella skúlaøki. So at siga allir KT-vegleiðarar hava givið játtandi svar til at hava 5 styttri skeið, ið KT-Depilin frá MMS hevur fingið loyvi til at gjøgnumføra. (KT-depilin)

**ad 6-7:**

Sum tað skilst av svarinum frá Mentamálastýrinum, so er ætlanin at útbúgva fleiri KT-vørðir í framtíðini. Møguliga verður hildið fram longu næsta ár. Hetta kemst av, at tað hevur víst seg at vera sera trupult hjá KT-vørðum at røkja fleiri skúlar. Upprunaliga var ætlanin tann, at KT-vørðir skuldu røkja fleiri skúlar ella skúlaøki.

Ein skipan viðv. KT-vørðum var gjørd til skúlaárið 2000/2001, men varð ikki gjøgnumførd sum ætlað. Orsøkin til tess, var sum áður nevnt, at tað var trupult hjá KT-vørðum at taka sær av fleiri skúlum. Hetta var serliga galdandi hjá teimum, ið starvast á teimum størru skúlunum. Eisini ynsktu fleiri skúlar, at KT-vørðurin í byrjanini var ein av lærarum skúlans, tí annars varð tað so tungt hjá lærarum at fáa hjálp, tá ið okkurt bagdi. Skipanin eydnaðist ikki til fulnar og tí eru tað ístaðin lærarar, ið hava nakað av kunnleika til teldur, sum røkja KT-varða arbeiðið á einstøkum skúlum. (MMS.)

**Fyritreytir læraranna - niðurstøða**
Tey skeið, ið verða fyriskipaði í framtíðini, eiga at verða bæði verklig og námsfrøðilig. Bæði eru neyðug vegna ta KT-menning, sum er í nútíðarsamfelagnum. Tað skal tó nevnast, at danskar kanningar av fólkaskúlalærarum vísa, at tørvurin á námsfrøðiligum/didaktiskum skeiðum er ógvuliga stórur. Orsøkin er tann, at flestu skeiðstilboð, sum standa donskum lærarum í boði, eru skeið, ið serliga leggja dent á tøkniligar førleikar, meðan skeiðstilboðini, ið leggja dent á teir námsfrøðiligu/didaktisku førleikarnar, hava verið og eru nógv færri.
Boðskapurin frá donskum lærarum er greiður. Teir hava brúk fyri tøkniligum KT-skeiðum, eingin ivi um tað, men teir hava í nógv størri mun tørv á skeiðum, sum leggja dent á tær námsfrøðiligu/didaktisku avbjóðingar, sum lærararnir møta, tá kunningartøkni skal nýtast í tí dagligu undirvísingini.
Flestu KT-eftirútbúgvingarskeið, sum eru og verða fyriskipaði í Føroyum, eru styttri skeið, ið leggja stóran dent á tøkniliga partin; meðan tann námsfrøðiligi parturin ikki hevur so stóran "prioritet". Hesi skeiðini, eru sonevnd kunningarskeið, ið oftast geva skeiðsluttakarunum eina stutta gjøgnumgongd, ella sagt við øðrum orðum, eitt grunt innlit í skeiðsevnið.
Hyggja vit eftir, hvat ið føroyskir skúlaleiðarar siga, og skulu vit taka útsagnir teirra í álvara, so mugu vit ásanna, at støðan kundi verið betri viðv. eftirútbúgvingar-møguleikum. Ein stór helvt av spurdu skúlaleiðarunum meta, at nóg mikið er av eftirútbúgvingarmøguleikum, meðan aðrir siga, at ov fá tilboð eru til lærarar á hesum øki. So eru tað aftur nakrir, ið ikki vita, hvussu støðan er viðv. eftirútbúgvingar-møguleikum innan kunningartøkni. Somuleiðis eru tað fleiri av skúlaleiðarunum, ið siga, at tað eru bert nakrir av lærarum skúlans, ið gera brúk av teimum skeiðstilboðum, ið standa lærarum í boði.
Samanumtikið kann sigast, at fleiri og meira fjøltáttaði skeiðstilboð eiga at standa lærarum skúlans í boði. Stutt skeið, ið eru kunnandi, og longri skeið, ið eru tøknilig, men so sanniliga námsfrøðilig/didaktisk, og sum leggja dent á, hvussu vit gerast før fyri at taka við teimum avbjóðingum vit dagliga eru í, tá kunningaratøkni skal dragast inn í allar lærugreinir og verkevni skúlans.
Um eftirútbúgvingin av lærarum fólkaskúlans innan kunningartøkni skal koma øllum skúlaverkinum til góðar, so er tað av størsta týdningi, at avvarðandi myndugleikar og leiðslur fólkaskúlans fáa eyga á tørvin og skapa teir karmar, ið eru neyðugir, so at hin einstaki lærarin fær umstøður til at menna seg bæði fakliga og námsfrøðiliga innan kunningartøkni, og regluliga fær møguleika at eftirútbúgva seg. Somuleiðis er tað av størsta týdningi, at teir lærarar, ið serliga hava áhuga fyri at arbeiða við kunningartøkni, fáa betri møguleikar at koma á størri eftirútbúgvingarskeið. Hesir áðurnevndu lærarar eru sera virðismiklir í tí lokalu tilgongdini, tá vælútgreinaðar lokalar undirvísingarætlanir innan kunningatøkni skulu gerast fyri hin einstaka skúlan. Undirvísingarætlanir, sum eisini mynda framtíðarætlanir skúlans á KT-økinum.

# Lutmál 3 Undirvísingarætlanir

Sum áðurnevnt, eru stórar samfelagsbroytingar hendar seinnu árini. Eins og grannalondini, hevur føroyska samfelagið ment seg til eitt sokallað kunningarsamfelag, ið setur stór krøv til útbúgvingarverkið í síni heild, og tí eisini til leiðslur, lærarar og næmingar fólkaskúlans. Vit hava eisini eina fólkaskúlalóg við viðmerkingum, ið setur síni krøv viðv. KT, og sum leggur stóran dent á, at

kunningartøkni eigur at vera ein natúrligur "integreraður" partur av allari undirvísing í fólkaskúlanum.
Við kunningartøkni, eru í grundini allir undirvísingarmiðlar at finna, sum hava verið og dagliga eru í brúki í fólkaskúlanum. Men tað skal tó sigast, at støðan er rættiliga nógv øðrvísi nú, enn áður. Nú eru allir hesir undirvísingarmiðlar at finna á brúkaraflatuni (skerminum). Talan er um tekst, tøl, ljóð, myndir og upptøkur á video, ið uttan trupulleikar kunnu arbeiða saman eftir tí tørvi, ið brúkarin til eina og hvørja tíð setur.
Men tað er umráðandi at fáa staðfest, at kunningartøkni er meira enn ein nýggjur undirvísingarmiðil, sum er komin í staðin fyri teir gomlu. Við kunningartøkni hevur fólkaskúlin fingið ein øðrvísi undirvísingarmiðil, ið gevur rúm fyri nýggjum og meira fjølbroyttum undirvísingarhættum, sum bæði hava fakligar og námsfrøðiligar/didaktiskar fyrimunir, bæði fyri lærarar og næmingar.
Spurningurin er tí, hvussu vit megna at menna fólkaskúlan á KT-økinum, soleiðis, at menningin av hesum undirvísingarmiðli samsvarar við tey krøv, ið fólkaskúlalógin við tess viðmerkingum og kunningarsamfelagið annars setur?

## KT í skúlanum - ein námsfrøðiligur trupulleiki

Tá talan er um at menna fólkaskúlan á KT-økinum, verður orðaskiftið mangan snara yvir á spurningin, hvussu nógvar teldur eru í hvørjum skúla, og hvussu fysisku umstøður skúlans annars eru, heldur enn eitt námsfrøðiligt/didaktiskt orðaskifti um, hvussu vit best kunnu gera nýtslu av teimum undirvísingarmøguleikum, ið eru innan KT.
Seinnu árini hava nógvar leiðslur valt at "prioritera" tann tøkniliga partin høgt, fyri at hesin partur ikki skal verða til hindurs fyri, at kunningartøkni skal kunna "integrerast" í alla undirvísing, meðan teir námsfrøðiligu/didaktisku førleikar lærarann í stóran mun ikki eru nøktandi, so at KT natúrliga verður drigið inn í alla undirvísing, sum tað sambært lóg og viðmerkingum eigur.
*"Grænserne for anvendelse af Edb i skolen er derfor i realiteten ikki længere et teknologisk problem, men et pædagogisk problem. Kvaliteten af det arbejde, der kan foregå i skolen ved hjælp af Edb afhænger derfor ikki længere af teknologien, men af kvaliteten af de pædagogiske overvejelser, der foregår i hovedet på dem, der anvender dem. (Steen Larsen)"*

## KT-undirvísingarætlan

Ein høvuðstreyt fyri, at KT, út frá fólkaskúlalóg, viðmerkingum og krøvum, ið kunningarsamfelagið setur, kann gerast ein heilt natúrligur partur av øllum lærugreinum og verkevnum, er tann, at hvør einstakur skúli hevur eitt *mál* og eina vælútgreinaða KT-undirvísingarætlan/strategi, ið er ein mannagongd (proces), sum leiðsla og lærarar skúlans eru ein partur av. Ein KT-undirvísingarætlan, ið er evnað til, út frá teimum kostnaðarligu og menniskjaligu tilfeingismøguleikum, ið eru.
Tá talan eru um at gera lokalar KT-undirvísingarætlanir, so noyðast vit at ásanna, at føroyska fólkaskúlaverkið lítlar ella ongar royndir hevur á hesum øki. Hetta sæst eisini sambært tí svari, ið fleiri fólkaskúlaleiðarar góvu í spurnarblaðs-kanningini viðv. spurninginum um lokalar lesiætlanir fólkaskúlans á KT-økinum. Nakrir fáir skúlar hava einans nøkur "yvirornaði" punkt, sum er teirra mál og ætlan. Fleiri skúlar hava als onga ætlan/strategi, meðan nakrir skúlar hava ætlanir um at gera eina.
Føroyski fólkaskúlin kann læra nógv av teimum royndum, ið eitt nú danir hava gjørt, tá talan er um at gera KT-undirvísingarætlanir. Nógvar danskar kommunur og skúlar hava gjørt vælútgreinaðar KT-ætlanir, ið innihalda eitt mál og eina ætlan/strategi.

Teirra arbeiði at gera KT-undirvísingarætlanir til teir einstøku skúlarnar, eru aloftast í trimum "fasum":

**"Status-fasa"**
Kannað verður eftir, hvussu støða skúlans er viðv. KT-útbúnaði og forritum. Somuleiðis verður dentur lagdur á, at finna fram til, hvussu hugburður læraranna er til kunningartøkni og hvørjar KT-førleikar lærararnir hava.

**"Visións-fasa"**
Ein hóskandi bólkur av lærarum skúlans finnur fram til, hvat ið skúlin vil á KT-økinum tey næstu árini við atliti til KT-førleikar læraranna, næminganna, nýtslu av KT í undirvísingini, menning av KT-útbúnaði og skúlans netskipan.

**"Handlings-fasa"**
Ein fasa, hvar ið KT-undirvísingarætlan skúlans verður gjørd liðug út frá teimum grundreglum, ið vórðu settar í "visións-fasuni", og við atliti til "status-fasuna".

Tað skal tó undirstrikast, at tað finst ongin felagsregla ella felagsnevnari fyri, hvat ið ein lokal KT-undirvísingarætlan skal innihalda, ella hvussu hon skal síggja út; men ein KT-undirvísingarætlan eigur sum eitt minsta krav at taka støði í og lýsa fylgjandi umráði: (Skolen ITiden s.38)

1. hvat ið skúlin vil á KT-økinum
2. hvat skúlin í dag er førur fyri á KT-økinum
3. hvat skúlin manglar at gera á KT-økinum

**KT-ætlanir - leiðslunnar ábyrgd**
Tað er leiðslunnar ábyrgd at virka fyri, at hin einstaki skúlin hevur, ella fær, eina ætlan/strategi á KT-økinum. Eina ætlan/strategi, ið skal miðja ímóti at fáa eina KT-undirvísingarætlan við einum greiðum KT-endamáli. Hetta er galdandi, óansæð hvussu lítið ella nógv hin einstaki leiðarin er vitandi um teir møguleikar, ið KT hevur.
Royndir vísa, at ein væleydnað KT-undirvísingarætlan, ið hevur sum endamál, at KT skal "integrerast" í allar lærugreinir og verkevni skúlans, er fyrst og fremst treytað av, at skúlans leiðsla er opin og vísir áhuga fyri tí tilgongd (proces), ið er neyðug, fyri at "integratiónin" skal eydnast. Tað er leiðslan, ið hevur kostnaðarligu og námsfrøðiligu ábyrgdina, og tí er tað leiðslan, sum í samstarvi við onnur, skal taka stig til, at skúlin framhaldandi er í støðugari menning á KT-økinum.
Somuleiðis er uppgáva leiðslunnar at skapa fyritreytir og gagnnýta ta "KT-kompetancu", ið lærarar skúlans hava, til støðugt at verða við í áðurnevndu tilgongd (proces) at gera vælútgreinaðar KT-undirvísingarætlanir. Men støðan viðv. hesi "KT-kompetancu" er so ógvuliga ymisk frá einum skúla til annan. Við fleiri skúlar er ein KT-vegleiðari ella KT-vørður í starvi. Á øðrum skúlum starvast bæði KT-vegleiðari og KT-vørður; meðan fleiri skúlar ikki eru eins væl fyri viðv. fólki við KT-førleika.
Fyri at fáa eitt nøktandi úrslit, tá talan er um at menna hin einstaka skúlan innan kunningartøkni, og at gera eina undirvísingarætlan við einum greiðum KT-endamáli, er umráðandi, at allir lærarar skúlans kenna seg sum ein part av tilgongdini; men tað eigur tó at vera ein ávísur bólkur av lærarum, ið skipar arbeiðið við at gera "status", formulera KT-mál og ætlanir. Hesin lærarabólkur eigur at verða umboðaður av:

- skúlans leiðslu

- skúlans KT-vørði / KT-vegleiðara / bókavørði
- ávísum lærarum við serligum áhuga fyri kunningartøkni

**Námsfrøðiligur tænastudepil skúlans**

Í framtíðar skúlanum kemur skúlabókasavnið at hava stóran týdning sum námsfrøðiligur tænastudepil. Á einum vælútgjørdum skúlabókasavni eru góðir møguleikar fyri t.d. bólkaarbeiði, evniskunnandi undirvísing og verkætlanararbeiði, hvar ið næmingar sjálvir, ella við hjálp og vegleiðing, kunnu leita fram upplýsingar úr bókum, tíðarritum, forritum og frá internetinum.
Skal skúlabókasavnið koma at virka sum ein námsfrøðiligur tænastudepil í nútíðarsamfelagnum, so er alneyðugt, at greiðar reglur verða gjørdar, ið greina, hvussu tænastudepilin skal virka í dagligdegnum. Somuleiðis er tað av størsta týdningi, at teir játtandi myndugleikarnir verða gjørdir varugir við tørvin á einum vælvirkandi námsfrøðiligum tænastudepli, og bera kostnaðin av honum.
Eins og tað er neyðugt at hava bæði lands- og lokalar undirvísingarætlanir fyri tær einstøku lærugreinirnar og kunningartøkni, so er tað alneyðugt at hava eina undirvísingar- og virkisætlan, ið hevur sum endamál at menna námsfrøðiliga tænastudepilin til gagns fyri allan fólkaskúlan.

**KT-undirvísingin í fólkaskúlanum**

Um vit hyggja eftir, hvussu KT-undirvísingin í føroyska fólkaskúlanum er skipað í dag, so gerast vit varug við, at framhaldsskúlarnir oftast skipa KT-undirvísingina sum eina vallærugrein, nevnd teldulæra, við tveimum tímum um vikuna. Á teimum smærru skúlunum, er sjálvandi ikki talan um KT sum vallærugrein; men at KT verður tikið inn sum ein natúrligur partur av undirvísingini, ella tá tørvur er á tí. Tað eru ógvuliga fáir skúlar, ið gera brúk av styttri skeiðum, har kunningartøkni er ein partur av skeiðnum.
Í stóran mun er tað galdandi fyri áðurnevndu undirvísing, at ongin vælútgreinað undirvísingarætlan innan KT liggur til grund fyri undirvísingini. Hetta er óheppið, tí sum skúli og lærarar standa vit frammanfyri eini stórari felags uppgávu at menna fólkaskúlan á KT-økinum, tá talan er um, at KT skal "integrerast" í allar lærugreinir fólkaskúlans. Men fólkaskúlalógin við tess viðmerkingum sigur onki um, hvørji mál skulu "prioriterast" hægst, nær og í hvørjari raðfylgju tingini skulu henda, og hvør ið hevur ábyrgdina fyri hvørjum. Hetta er ein av størstu grundunum til, at hin einstaki skúlin fer undir at gera eina KT-undirvísingarætlan fyri allan skúlan. Eina KT-undirvísingarætlan við einum greiðum KT-endamáli.

# Lutmál 4 Umstøður/karmar

**Skúlans bygnaður**

Í Føroyum eru stórt sæð allir skúlar skipaðir á sama hátt. Undirvísingin av næmingum skúlans er í flestu førum deild upp í sonevnd tíðar-modul, og fer oftast fram í ógvuliga smáum og mangan einsháttaðum flokshølum. Henda skúlaskipan hevur tað við sær, at tað mangan kann tykjast lættari at lata hurðina aftur inn til flokshølið, og arbeiða fyri seg sjálvan, enn at hava eitt veruligt samarbeiði um flokkar, lærugreinir og lærarannа millum. Her skal tó nevnast, at samarbeiðið lærarannа millum er økt nógv seinnu árini, og fer at økjast enn meira. Í hvørjum flokki er eitt lærara-toymi, ið hevur skyldu til at arbeiða tætt saman. Eisini eru ársætlanir fyri hvønn einstakan flokk tøkar. Hesar ársætlanir eru eitt úrslit av tøttum lærarasamstarvi.

Skúlabygningarnir eru ógvuliga líkir á útsjónd. Ofta langir og høgir bygningar við nógvum flokshølum eftir longu og smølu gongunum, ið binda hæddirnar saman. Skúlarnir hava oftast eitt ella tvey telduhøli, ið lærarar og næmingar skúlans skulu gera nýtslu av í undirvísingini. Flokshølini eru mangan so smá, at tað kann tykjast trupult at fáa pláss til, at næmingarnir t.d. kunnu arbeiða í smáum bólkum.
Hyggja vit eftir tí sosiala bygnaðinum í fólkaskúlanum, so mugu vit ásanna, at tann sosiali bygnaðurin í stóran mun speglast aftur í sjálvum skúlabygnaðinum. Øll í leiðsluni hava eitt arbeiðspláss, ið er teirra egna. Lærararnir hava einans lærararúmið, ið er eitt felagsrúm fyri allar lærarar. Tað eru ógvuliga fáir skúlar, ið hava arbeiðsrúm til teir einstøku lærararnar. Støðan hjá næmingunum eru ikki betri á nógvum skúlum. Onki felagsrúm ella kantina. Næmingarnir hava einans flokshølið sum teirra persónliga arbeiðspláss, bæði tá talan er um undirvísing og fyrireiking.

**<u>"Plasering" av KT-útbúnaði skúlans</u>**

At KT gerst meir og meir ein partur av undirvísingini, er sjálvsagt. Men enn vantar tó nógv, til allir næmingar eru javnsettir hesum viðv. Fyrr enn vit hava teldur við møguleika fyri íbinding til internetið í hvørjum flokshøli, kunnu vit ikki siga, at endamálið viðv. brúki av kunningartøkni kann verða nátt. Tað er heldur ikki nóg mikið við einari teldu inni í hvørjum flokshøli; men helst so mangar, sum ásetta minstakravið er. Tað vil siga ein telda til hvørjar 9 næmingar. Hetta vil í flestu førum viðføra, at 2-3 teldur skulu vera í hvørjum flokshøli. Hetta krav er á ongan hátt órímiligt, tí tað er ein sannroynd, at við einum ella tveimum telduhølum, noyðast lærarar og næmingar at bíleggja pláss dagar og vikur frammanundan, teir skulu nýta teldur skúlans. Tað er tí bert partvíst rætt, tá ið sagt verður, at flestu skúlar hava ment tann tøkniliga partin, soleiðis, at tann tøkniliga síðan ikki er nøkur beinleiðis forðing fyri KT-menningini í fólkaskúlanum. Spurningurin um KT-menning í fólkaskúlanum er tí eisini tengdur at, hvussu útbúnaðurin er "plaseraður" og hvussu atkomiligur og brúkaravinarligur útbúnaðurin er, fyri lærarar og næmingar skúlans.

**<u>Trupulleikar viðv. umstøðum/karmum skúlans</u>**

Tá talan er um at betra um umstøður/karmar skúlans viðv. KT-menningini í fólkaskúlanum, so eru nógvir smærri og størri trupulleikar, ið leiðslur og lærarar skúlans dagliga hava at dragast við. Nevnast kunnu:

**Skylda kommunalmynduleikanna**

Sjálvt um rættiliga nógvir skúlar hava fingið fíggjarligan stuðul til teldukeyp, so er tað framhaldandi ein stórur trupulleiki at sannføra kommunurnar um, at tað er teirra skylda sambært grein 23 í fólkaskúlalógini *"at bera útreiðslurnar av undirvísingarmiðlunum"*. Tí eru íløgur og viðlíkahald av telduútbúnaði fólkaskúlans eitt kommunalt mál. T.v.s, at kommunan hevur ábyrgd av, at skúlin er útgjørdur, so at næmingarnir fáa ta undirvísing, sum lógin krevur.

**Flokshølini**

Í flestu skúlum, eru tey ofta smáu flokshølini gjørd til at rúma 20 - 25 næmingum og ikki fleiri føstum teldum. T.v.s, at teir fysisku karmarnir viðv. flokshølunum ikki eru nøktandi, hvat ið "KT-integrering" viðvíkur.

**Forrit**
Støðan viðv. sonevndum arbeiðs- og lærugreinaforritum er ymisk frá skúla til skúla. Fleiri skúlar eru hampiliga væl fyri, meðan aðrir skúlar eru illa fyri. Orsøkirnar eru m.a.:

- vantandi ráðgeving um forrit
- vantandi kunnleiki um nýtslu av KT í undirvísingini
- vantandi tøkniligar fyritreytir
- vantandi økonomiskar fyritreytir
- vantandi hugburður

**Telduhøli/ir skúlans**
Teldur skúlans eru ein partur av teimum undirvísingarmøguleikum, sum tøkir eru. Hvussu teldurnar verða brúktar, velst í stóran mun um, hvussu tøkar tær eru, um talið av teldum í mun til næmingar, og hvussu langt tað er at koma til teldurnar. Er tað bert talan um eitt ella møguliga tvey telduhøli, sum tað nógvastaðni er, so er tað ein sannroynd, at tað skal ógvuliga lítið til, fyri at lærarar gerast mótfalnir, og tí ikki gera brúk av teimum KT-møguleikum, skúlin hevur.

**Smærri telduverkstaðir**
Tað eru ógvuliga fáir av okkara skúlum, ið hava smærri hølir ella telduverkstaðir, hvar ið nakrar fáar teldur eru tøkar hjá smærri næminga-bólkum, ið hava møguleika at arbeiða við einum ella øðrum ávísum evni.

**Námsfrøðiligur tænastudepil**
Á fleiri bókasøvnum (námsfrøðiligur tænastudepil), hava næmingar skúlans lítlar ella ongar møguleikar, at leita fram upplýsingar við hjálp av kunningartøkni. Orsøkirnar kunnu t.d. vera:

- hølisviðurskiftini - ov lítið pláss til KT-útbúnað
- skúlin hevur onki bókasavn
- fíggjarligur spurningur
- vantandi hugburður til KT frá leiðslu, lærarum og bókavørði
- ongin bókavørður/lærari, ið tekur sær av bókasavnsarbeiðinum
- einans nakrir fáir bókasavnstímar játtaðir

**Netskipan skúlans:**
At fáa til vega KT-útbúnað, er bert byrjanin, ið mangan er tung; men KT er í støðugari menning. Umframt menningina av teldueindini, so mennist eisini nettøknin at knýta teldurnar saman, so at útbúnaðurin kann virka sum ein innanhýsis eind, samstundis sum samband fæst við internetið.
Hyggja vit eftir teimum flestu skúlabygningunum í Føroyum, so eru teir gjørdir soleiðis, at tað er rættiliga kostnaðarmikið at fáa knýtt øll høli skúlans saman í eitt innan-net við felags-ambætarum. Tað er tí at fegnast um, at MMS hevur ætlanir um, at veita stuðul til kommunurnar til at útvega skúlunum netskipanir, so at samband fæst við innan-/internet úr øllum hølum skúlans. (KT-depilin)

**Umstøður læraranna**
Um vit hyggja eftir teimum umstøðum, ið lærarar fólkaskúlans dagliga virka undir á KT-økinum, so mugu vit ásanna, at tær á mangan hátt ikki eru nøktandi og í ávísum førum beinleiðis ørkymlandi. Ein rættiliga stórur partur av lærarum fólkaskúlans hevur ongar møguleikar til fyrireiking á sínum egna arbeiðsplássi, sjálvt um KT-útbúnaður er tøkur á skúlanum. Trupulleikin er tann, at tað eru bæði lærarar og næmingar, ið gera brúk av honum.
Tað er ongin ivi um, at umstøður læraranna, bæði heima og í skúla, hava alstóran týdning, tá talan er um KT-førleikar læraranna, og hvussu framtíðar-skúlin fer at mennast á KT-økinum. Teimum skal tí regluliga standa eftirútbúgvingarskeið í boði - bæði tøknilig og námsfrøðilig.
KT-menningin hevur havt tað við sær, at ein stórur partur av tí fyrireiking, sum ein lærari hevur í sínum dagliga starvi, er úti á internetinum. Til hetta er at siga, at tað ikki kann góðtakast, at lærarar sjálvir bera kostnaðin av hesi fyrireiking. Tí eiga allir lærarar fólkaskúlans at fáa "kompensatión" fyri ta tíð, teir nýta til fyrireiking úti á internetinum. Somuleiðis eiga allir lærarar skúlans at fáa stuðul til keyp av KT-útbúnaði, ið er ein høvuðstreyt fyri, at hin einstaki lærarin megnar at fylgja við tí framburði, sum er innan kunningartøkni.

# Lutmál 5 Økonomiskar fyritreytir

**KT-í fólkaskúlanum - ein kostnaðarmikil uppgáva**
Vit tosa um eina fíggjarliga tunga uppgávu, tá ið talan er um at menna fólkaskúlan á KT-økinum. Ein uppgáva, ið bæði land og kommunur eiga at bera kostnaðin av. Ein av mongum fyritreytum fyri, at KT kann gerast ein natúrligur "integreraður" partur av fólkaskúlanum er, at KT-útbúnaðurin er í lagi. Seinnu árini hevur føroyski fólkaskúlin gjørt stórar íløgur, fyri at menna tann tøkniliga partin innan kunningartøkni. Hetta eru ikki íløgur, ið koma fyri eina ferð, men íløgur, ið endurtaka seg við jøvnum millumbilum. Tann tøkniliga menningin innan KT gongur eisini við tílíkari ferð, at útbúnaðurin eldist eftir kortari tíð.
Sambært fólkaskúlalógini er tað kommununnar skylda at útvega fólkaskúlanum tey undirvísingaramboð, ið til eina og hvørja tíð eru neyðug. Hetta er ikki minst galdandi fyri tey undirvísingaramboð, ið skulu til, fyri at KT kann mennast í fólkaskúlanum.
Sum støðan er í dag, so eru tað rættiliga nógvar kommunur, ið hava fingið fíggjarligan stuðul frá MMS. Hesin stuðul hevur í nógvum førum virka við til, at kommunur hava megna at veitt skúlanum neyðugar fíggjarligar umstøður til at menna tann tøkniliga partin innan kunningartøkni.
Men í framtíðar-skúlanum er ikki nóg mikið at hava eitt ella tvey telduhøli, ið eru vælútgjørd við telduum. Tað verður í framtíðini neyðugt, at telduútbúnaður kann nýtast í øllum hølum skúlans, og at øll høli verða bundin saman í eitt innan-net við felags-ambætarum og við atgongd til internetið. Hetta er ein sera stór og kostnaðarmikil uppgáva, ið nógvar kommunur ikki hava fíggjarliga orku til uttan stuðul frá landsmyndugleikunum.
Tað er eisini umráðandi, at tær økonomisku fyritreytirnar eru til staðar, tá talan er um undirvísingar-forrit. Forrit av ymsum slag, ið lærarar fólkaskúlans, á ein mennandi og fjølbroyttan hátt, kunnu brúka í undirvísingini. Her kunnu verða nevnd forrit, ið fevna um:

- tekstviðgerð

- rokniark
- framløgu
- myndaviðgerð
- undirvísingar-forrit til ymsu lærugreinirnar
- spæli- og læriforrit
- net-samskifti
- net-publicering
- digitalt ljóð og video

**Stuðul frá lands- og kommunalmyndugleikum**

Skal tað eydnast fólkaskúlanum at fylgja við samfelagsins KT-menning, so er tað umráðandi, at bæði leiðslur og lærarar fólkaskúlans vísa lands- og kommunalmyndugleikunum á, at tær økonomisku fyritreytirnar eru av største týdningi fyri framhaldandi menning á KT-økinum.
Tann stuðul, ið hevur verið veittur av landsmyndugleikunum til framkomna teldu- og samskiftisútgerð, er neyðugur hjá flestu kommunum, og eigur framhaldandi at verða veittur. Somuleiðis eiga skúlans leiðslur at vísa kommunalu myndugleikunum á, at skal fólkaskúlin fylgja við samfelagsgongdini á KT-økinum, noyðist skúlin at hava eina KT-ætlan við einum greiðum undirvísingarendamáli - eina KT-ætlan, ið eisini hevur eina vælútgreinaða kostnaðarætlan, ið tekur hædd fyri:

- framtíðarætlanum skúlans á KT-økinum
- nýggjum KT-útbúnaði
- vanligum viðlíkahaldi
- nýggjum forritum
- internetgjaldi
- størri KT-umvælingum

Eins umráðandi og tað er hjá fólkaskúlanum at hava eina KT-ætlan, líka týdningarmikið er tað, at tær einstøku kommunurnar hava eina KT-ætlan/strategi, ið veitir fólkaskúlanum tær neyðugu økonomisku fyritreytirnar at arbeiða undir. Fyritreytir, ið gera tað møguligt hjá leiðslum fólkaskúlans at virka fyri, at framkomna teldu- og samskiftisútgerðin verður brúkt á ein mennandi og skapandi hátt av lærarum og næmingum fólkaskúlans.

# Samandráttur

Sum áður nevnt, eru teir formligu karmarnir viðv. kunningartøkni í fólkaskúlanum í lagi. Sambært nýggju fólkaskúlalógini og hartil galdandi lesiætlanum, er onki til hindurs fyri, at føroyski fólkaskúlin kann mennast á KT-økinum.
Men so einfalt er tað tó ikki, sjálvt um teir formligu karmarnir eru í lagi. Dag og dagliga uppliva leiðslur fólkaskúlans tann veruleika, at KT-umráðið í síni heild, er sett saman av nógvum ymiskum tættum, ið ikki altíð virka saman sum ein heild.Tað er t.d. nyttuleyst, at lógir og viðmerkingar viðv. KT eru í lagi, um leiðsla og lærarar hava ein ivasaman hugburð til KT. Somuleiðis er tað til onga nyttu at hava ein vælútgjørdan KT-útbúnað, meðan fyritreytir læraranna ikki eru nøktandi, og soleiðis kundi verið hildið fram.

Viðv. spurninginum um, hvørja ætlan/strategi leiðslur fólkaskúlans skulu velja, fyri at KT kann verða ein natúrligur partur av dagligdegi skúlans, er at siga, at tað helst eru líka nógvar hugsanir sum menniskju, og tí finst einki eintýðugt svar. Men skal spurningurin verða svaraður, so eigur tað at vera við atliti til fólkaskúlalógina, lærarafyritreytir, lesiætlanir, karmar/umstøður og økonomiskar fyritreytir.
Ein av mongum fyritreytum, ið skulu til, fyri at "integratiónin" av KT í undirvísingini skal eydnast, er uttan iva hugburður leiðslunnar og læraranna til kunningartøkni.
Tað er ein sannroynd, at tað finnast lærarar í fólkaskúlanum, ið hava ein ivasaman hugburð til KT, og sum treyðugt vilja brúka tíð og orku til at ogna sær royndir á KT-økinum. Tað er tí neyðugt, at bæði leiðslur og lærarar á teimum einstøku skúlunum, miðvíst og í felag, fara undir at menna fólkaskúlan á KT-økinum. Royndir í Danmark vísa, at hugburður læraranna til KT broytist til tað betra, tá áðurnevndu lærarar, við jøvnum millumbilum, hava høvi til at fara á eftirútbúgvingarskeið, og við tað, at teir kenna seg sum ein part av tí KT-menning, ið er á skúlanum.

**<u>KT í fólkaskúlanum - ein ætlan/strategi</u>**

**KT-útbúnaður skúlans**

Tøkniliga eiga leiðslur fólkaskúlans at virka fyri, at allir lærarar og næmingar skulu hava møguleika at gera brúk av nýmótans KT-útbúnaði í undirvísingini. Tað er ikki nóg mikið við einum ella tveimum væl útgjørdum telduhølum; men arbeiðast skal fram ímóti, at lærarar og næmingar kunnu gera brúk av KT í øllum undirvísingarhølum skúlans. Tað er umráðandi, at allir skúlar fáa teldur, ið svara til minsta kravið, ið MMS og KT-depilin hava ásett. Somuleiðis skal virkast fyri, at allar teldur skúlans verða knýttar saman í eitt innan-net við internet-sambandi.
Har talan er um fleiri skúlar, ið hoyra undir somu kommunu, verður tað sera kostnaðarmikið at knýta allar teldur skúlans saman í eitt innan-net, við at leggja kaðalar runt í øllum skúlabygningum. Tí eigur spurningurin um tráðleyst samband í slíkum føri at verða kannaður.

**Fyritreytir læraranna og eftirútbúgvingarmøguleikar**

Tað er uppgáva lands- og kommunalmynduleikanna eins væl og leiðslunnar, at virka fyri, at lærarar fólkaskúlans fáa møguleikar og umstøður til eftirútbúgving á KT-økinum. Somuleiðis eiga teir lærarar, ið serliga hava áhuga fyri KT í skúlahøpi, at fáa møguleikar til longri KT-skeið, ið eru eina til tvær vikur til longdar.
Viðv. spurninginum um fyritreytir læraranna, so er støðan tann í dag, at flestu lærarar hava tikið "KT-kort fólkaskúlans". Ein lítil partur av lærarum, hevur fingið ein sjálvlærdan KT-førleika, ið ger tað møguligt hjá teimum at brúka KT í undirvísingini. Og ein rímiliga stórur bólkur av lærarum hevur verið á smærri skeiðum, ið LMS og MMS hava skipað fyri. MMS og KT-depilin hava lagt lunnar undir eina skipan við KT-vegleiðarum og KT-vørðum, ið skulu virka við til at geva fólkaskúlanum íblástur og vegleiðing innan KT.
Undirstrikast skal, at tað ikki er nóg mikið at hava "KT-kort fólkaskúlans" ella ein sjálvlærdan KT-førleika. Regluliga eiga lærarar og leiðslur fólkaskúlans at fara á eftirútbúgvingarskeið. Skeið, ið eru tøknilig, men so sanniliga eisini námsfrøðilig/didaktisk, og sum leggja stóran dent á, hvussu KT kann dragast inn í alla undirvísing.
Sambært donskum kanningum, eru tað serliga tey námsfrøðiligu/didaktisku KT-skeiðini, ið vanta donskum lærarum. Sama ger seg galdandi hjá okkum. Í flestu førum er talan um sonevnd verklig/tøknilig skeið, meðan minni dentur verður lagdur á tey námsfrøðiligu.

Tey skeið, ið verða fyriskipaði í framtíðini, eiga í mest møguligan mun at liggja í nærumhvørvinum. Tað er lættari at flyta ein ella tveir skeiðshaldarar enn eitt stórt tal av skeiðsluttakarum. Somuleiðis er tað ein stórur fyrimunur, at skeiðsluttakararnir kenna telduútbúnaðin, ið nýttur verður.

**Hvør skal hava KT-skeiðini?**

Viðv. spurninginum, hvør ið skal hava KT-skeiðini, er at siga, at her eru tað helst mong, ið eru før fyri at undirvísa lærarum fólkaskúlans. Tað kunnu vera lærarar, ið hava upparbeitt ein KT-førleika innan ávís KT-øki. Síðani eru tað KT-vegleiðararnir, ið eru sera væl egnaðir at hava smærri og størri eftirútbúgvingarskeið. Viðv. KT-vørðunum er at siga, at teirra arbeiðsuppgáva er so stór og krevjandi, at tann niðurskurður, ið teimum er tillutaður, er alt ov lítil, til eisini at hava skeiðvirksemi fyri lærarum og leiðslum fólkaskúlans.
MMS og KT-depilin eiga at útbúgva fleiri KT-vørðir, so at flest allir skúlar hava ein KT-vørð, sum m.a. skal taka sær av at røkja teldurnar og leiðbeina leiðslum og lærarum skúlans. Sum støðan er í dag, er arbeiðsbyrðan hjá KT-vørðum fólkaskúlans alt ov stór. Tað er tí heilt órímiligt, at KT-vørðir skulu røkja fleiri skúlar ella ávís skúlaøki við fleiri skúlum.
Uppgávan, ið KT-vørður skúlans skal útføra, er sum sagt so kravmikil, at spurningurin er, um ikki KT-vørðuskipanin eigur at vera endurskoðað, soleiðis, at KT-vørðurin í størri mun verður tann kveikjandi persónurin, ið gevur námsfrøðiligan íblástur til lærarar og leiðslu skúlans á KT-økinum. Tann tøkniliga uppgávan er týdningarmikil; men tað er ein sannroynd, at trupulleikar fólkaskúlans á KT-økinum eru mangan av námsfrøðiligum slag.

**KT-undirvísingarætlan við greiðum KT-endamáli**

Sum áður nevnt, er tað av størsta týdningi, at leiðslur skúlans ganga undan, við at vera positivar og opnar fyri teimum menningarmøguleikum, ið eru innan KT. Tí eiga leiðslur skúlans at vísa áhuga fyri tí tilgongd (proces), ið er neyðug fyri, at KT kann dragast inn í allar lærugreinir og verkevni.
Tað er umráðandi, at hvør einstakur skúli hevur eitt KT-mál, ið sæst aftur í eini KT-undirvísingarætlan fyri skúlan. Henda KT-undirvísingarætlan eigur at vera ein støðug tilgongd, ið leiðsla og lærarar skúlans luttaka í og kenna seg sum ein part av. Her er talan um eina tilgongd, sum ikki tolir at steðga, um fólkaskúlin skal fylgja við tí KT-menning, sum er í kunningarsamfelagnum.
Leiðslur fólkaskúlans eiga at hava í huga, at tær hava ta kostnaðarligu og námsfrøðiligu ábyrgdina av skúlanum, og tí er tað leiðslan, sum í samstarvi við onnur, framhaldandi hevur skyldu til at menna fólkaskúlan á KT-økinum.
Á hvønn hátt ein KT-undirvísingarætlan skal evnast til, hvat innihaldið skal vera, og hvussu hon skal síggja út, kann vera ógvuliga ymist frá einum skúla til annan. Í Føroyum hava vit ikki drúgvar royndir, tá talan er um at gera KT-undirvísingarætlanir, og tí er tað ikki so sjáldsamt, at vit gera brúk av teimum royndum, ið eitt nú danir hava gjørt innan hetta umráði.
Sum nevnt í lutmáli trý, kann ein bólkur av lærarum, heilt frá byrjanini av, skipa arbeiðið við at gera KT-undirvísingarætlan skúlans. Í hesum bólki kunnu vera:

- umboð fyri skúlans leiðslu
- KT-vørður, KT-vegleiðari og bókavørður skúlans
- lærari/ar við serligum áhuga/førleika innan KT

Á hvønn hátt hesin lærarabólkur fer til verka, er sjálvandi torført at svara. Ein arbeiðsháttur, ið danir hava havt góðar royndir av, er sum áður sagt, at býta arbeiðið sundur í tríggjar fasir. Fyrst ein "status-fasu" síðani ein "Visións-fasu" og seinast ein "handlings-fasa". (Lutmál 3)

Leiðslur fólkaskúlans skulu gera sær greitt, at tað er nyttuleyst at tosa um, at KT natúrliga skal dragast inn í alla undirvísing, um ikki ein vælútgreinað KT-undirvísingarætlan við einum greiðum KT-endamálið er gjørd fyri teir einstøku skúlarnar. Líka umráðandi er tað, at allir lærarar, á ein ella annan hátt eru við í tilgongdini at evna KT-undirvísingarætlanina.

**Bókasavnið sum ein námsfrøðiligur tænastudepil**

Arbeiðast skal miðvíst fram ímóti, at allir skúlar skulu hava eitt bókasavn, ið skal virka sum ein námsfrøðiligur tænastudepil. Á bókasavninum skulu næmingarnir hava møguleika til at leita fram allar hugsandi upplýsingar úr bókum, tíðarritum, forritum og gjøgnum internetið. Somuleiðis skal virkast fyri, at bókasavnið er opið í skúlatíðini, og at næmingarnir kunnu fáa ráðgeving eftir tørvi. Tað eigur at finnast fram til eitt arbeiðsbýti millum bókavørð, KT-vørð, KT-vegleiðara og lestrarvegleiðara viðv. áðurnevndu ráðgeving. Skal skúlabókasavnið vera til gagns fyri lærarar og næmingar skúlans í dagligdegnum, eiga vælútgreinaðar reglur at verða gjørdar. Somuleiðis eigur ein undirvísingar- og virkisætlan fyri bókasavnið at verða gjørd, ið hevur til endamáls at menna bókasavnið sum ein tænastumiðdepil í framtíðarskúlanum. Henda undirvísingar- og virkisætlan eigur fyrst og fremst at vera evnað til av teimum, ið eru knýtt til bókasavn skúlans.

**Skúlans umstøður og økonomisku fyritreytir.**

Tá talan er um skúlans umstøður og økonomisku fyritreytir, so er tað umráðandi, at bæði land og kommunur eru tilreiðar at veita økonomiskan stuðul til at betra um umstøðurnar, og til at menna KT í fólkaskúlanum. Somuleiðis er tað neyðugt, at kunna land og kommunur um, at KT í fólkaskúlanum er eitt kostnaðarmikið umráði, sum á ongan hátt eigur at undirmetast, um fólkaskúlalógin við viðmerkingum skal haldast. Tað verður tí framhaldandi neyðugt, at MMS á ein ella annan hátt veitir kommunum stuðul til KT. Hesin stuðul er ein beinleiðis orsøk til, at fleiri kommunur vilja stuðla skúlum teirra á KT-økinum.

Umráðandi er, at bæði skúli og kommuna leggja eina langtíðar KT-fíggjarætlan, eina ætlan, ið ikki kemur óvart á nakran, men er eitt amboð, ið fremur skúlans ætlan á KT-økinum.

Tað er tó ein partur, ið er gloymdur, tá talan er um stuðul til KT, og tað eru lærararnir. Tað hevði ikki verið órímiligt, at lærararnir fingu endurgjald fyri teirra fyrireikandi arbeiði heima við hús. Somuleiðis kundu lærararnir fingið ein ella annan stuðul til teldukeyp. Vit skulu gera okkum greitt, at lærarar fólkaskúlans megna ikki at fylgja við tí menning, ið er á KT-økinum, uttan so, at lærararnir gerast persónligir brúkarar av KT. Framtíðin fer eisini at vísa tað, at tað verða einans teir lærarar, ið seta tíð av til KT-fyrireiking, ið koma at hava tað lættast við at nýta KT í undirvísingini.

## Spurnarblað til leiðslur fólkaskúlans (Skjal A)

**1 Er tygara skúli ein av fleiri skúlum í bygdini ella býnum?**

- ☐ Ja
- ☐ Nei

**2 Hvussu nógvir lærarar og ársvikarar starvast tils. í tygara skúla skúlaárið 2000/2001?**

- ☐ undir 10
- ☐ 10 - 20
- ☐ 20 - 30
- ☐ 30 - 40
- ☐ yvir 40

**3 Hvussu nógvir næmingar eru tils. í skúlanum skúlaárið 2000/2001?**

- ☐ undir 50
- ☐ 50 -100
- ☐ 100 - 150
- ☐ 150 - 200
- ☐ 200 - 250
- ☐ 250 - 300
- ☐ 300 - 400
- ☐ yvir 400

**4 Hvørjir flokkar eru í tygara skúla?**

- ☐ Forskúlafl.
- ☐ 1.-7.fl.
- ☐ 8.-10.fl.
- ☐ 1.-10.fl.
- ☐ Aðrir fl.

**5 Hvussu nógvar teldur hevur skúlin, sum verða nýttar í undirvísingini?**

- ☐ undir 5
- ☐ 5 - 10
- ☐ 10 - 20
- ☐ 20 - 30
- ☐ 30 - 40
- ☐ 40 - 50
- ☐ yvir 50

*Tú ert vælkomin at seta fleiri krossar!*

**6 Hvar standa teldur skúlans?**

- Teldurnar standa í einum telduhøli ☐
- Øll flokshøli hava minst eina teldu ☐
- Nøkur flokshøli hava teldur ☐
- Teldur standa inni á bókasavninum ☐
- Aðara staðni ☐

**7 Hvussu nógvar av teldum skúlans eru knýttar í eitt net við ambætara?**

- ☐ Allar
- ☐ Tær flestu
- ☐ Uml. helvtin
- ☐ Nakrar fáar
- ☐ Ongar teldur

**8 Hava teldur skúlans atgongd til internet og e-mail?**

- ☐ Allar
- ☐ Tær flestu
- ☐ Uml. helvtin
- ☐ Nakrar fáar
- ☐ Ongar teldur

**9 Hvussu er tykkara samband við internetið?**

- Uppringt samband ☐
- Uppringt ISDN-samband ☐
- Opið/fast samband ☐
- Onki samband ☐

**10 Hvussu nógvir næmingar eru uml. til hvørja teldu?**

Umleið ☐ næmingar til hvørja teldu

**11 Hava næmingarnir í tygara skúla fría atgongd til teldurnar í skúlatíðini?**

| | | |
|---|---|---|
| Barnaskúlin | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Framhaldsdeildin | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Serstakir flokkar | ☐ Ja | ☐ Nei |

**12 Hava næmingarnir atgongd til teldur skúlans eftir skúlatíð?**

☐ Ja ☐ Nei

**13 Hava tit KT-vørð ella ávísan lærara/persón, ið tekur sær av telduútbúnaði skúlans?**

- KT-vørður ☐
- Annar lærari/persónur ☐
- Ongin ☐

# Spurnarblað til leiðslur fólkaskúlans (Skjal A)

*Tú ert vælkomin at seta fleiri krossar!*

**14 Skal bert svarast, um tit hava KT-vørð ella annan lærara/persón, ið tekur sær av telduútbúnaði skúlans. Hvørjar uppgávur hevur KT-vørðurin ella lærarin/ persónurin, ið tekur sær av kunningartøkni skúlans?**

- ☐ Setur telduútbúnað skúlans upp
- ☐ Heldur telduútbúnaðin viðlíka
- ☐ Vegleiðir lær. og næm. skúlans við átorkandi spurningum
- ☐ Heldur smærri skeið viðv. teldum og forritum fyri lær. skúlans
- ☐ Vegleiðir lær. skúlans viðv. "integratión" av KT í fráløruni
- ☐ Hjálpir lær. skúlans viðv. KT av meira óformligum slag
- ☐ Hjálpir næm.. skúlans viðv. KT av meira óformligum slag
- ☐ Er við í lesiætlanararbeiði skúlans viðv. kunningartøkni

**15 Hava lærarar skúlans tikið "KT-kort fólkaskúlans"?**

- ☐ Allir lærarar
- ☐ Flestu lær.
- ☐ Ongin lærari

**16 Hava allir lærarar skúlans atgongd til SamHøll við brúkaranavni og loyniorði?**

- ☐ Allir lærarar
- ☐ Flestu lær.
- ☐ Ongin lærari

**17 Hava næmingarnir í tygara skúla atgongd til SamHøll við brúkaranavni og loyniorði?**

- ☐ Allir næm.
- ☐ Flestu næm.
- ☐ Serstakir fl.
- ☐ Ongin næm.

*Tú ert vælkomin at seta fleiri krossar!*

**18 Hvussu verður KT-undirvísingin skipað í tygara skúla?**

- ☐ Sum ein serstøk vallærugrein
- ☐ Sum styttri skeið (tímar, dagar, vikur)
- ☐ Sum ein heilt natúrligur partur av vanligu fráløruni (integratión)

**19 Um kunningartøkni í framtíðini skal verða ein heilt natúrligur partur av allari frálæru í øllum lærugreinum. Hvør skal eftir tygara meting taka sær av KT-fráfrálæruni?**

- ☐ Flokslærarin
- ☐ KT-vørðurin
- ☐ Lærari saman við KT-vørði ella øðrum lærara/persóni
- ☐ Allir lærarar skúlans

**20 Gera lærararnir á tygara skúla brúk av teimum skeiðsmøguleikum, ið eru innan kunningartøkni?**

- ☐ Allir lærarar
- ☐ Flestu lær.
- ☐ Nakrir lær.
- ☐ Ongin lærari

**21 Eru nóg mikið av eftirútbúgvingar-møguleikum á KT-økinum hjá lærarum fólkaskúlans?**

- ☐ Ja
- ☐ Nei
- ☐ Veit ikki

**22 Hevur tygara skúli fingið fíggjarligan stuðul frá Mentamálastýrinum til teldukeyp?**

- ☐ Ja
- ☐ Nei

**23 Hevur bý- ella bygdarráðið nakra KT-ætlan/strategi, ið virkar við til at menna tygara skúla á KT-økinum?**

- ☐ Ja
- ☐ Nei
- ☐ Veit ikki

**24 Játtar kommunan skúlanum pening til at menna fylgjandi umráði?**

| | | |
|---|---|---|
| Maskinpartin (hardware) | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Tekniska-partin (software) | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Lærugreinirnar (við at stuðla keypi av frálæru-forritum) | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Lærararnar (stuðla lær. viðv. keypi av heimateldum) | ☐ Ja | ☐ Nei |
| Lærararnar (stuðla lær. viðv. internet-gjaldi) | ☐ Ja | ☐ Nei |

**25 Hava tit í lokalu lesiætlan skúlans og í ársætlanunum lagt eina ætlan/strategi um, hvussu KT kann gerast ein heilt natúrligur partur í øllum lærugreinum?**

- ☐ Ein skriftlig ætlan/strategi er gjørd
- ☐ Skúlin hevur einans nøkur "yvirornaði" punkt viðv. skúlans ætlan/strategi
- ☐ Hava tosað um at gera eina ætlan/strategi
- ☐ Ongin ætlan/strategi

# Keldulisti

***Bøkur:***

**SKOLEN ITiden**
-væsentlige elementer i en fortsat IT-udbygning
Bent B. Andresen (1999)

**fra kontrol til kaos**
inspirationsmateriale om brug af internet i skolen
Kirsten Ehrhorn og Frank Bach Jensen (1997)

**Ringe i vandet**
inspirationsmateriale fra lærer til lærer om undervisning og IT
Frank Bach Jensen (1999)

**IT og nye læreprocesser**
Steen Larsen (?)

**IT-strategi i folkeskolen**
Keld Larsen (1998)

**IKT i folkeskolen**
Lærernes behov for efteruddannelse
Allan J. Christensen (ansv.) (okt. 1999)
Jane Andersen
Ina A. Mance

**Rum til læring**
**En idé og debatbog om nye læringsformer med IKT**
Erik Prinds 1999

------------------

**Kunningartøkni í fólkaskúlanum**
**FRÁGREIÐING OG TILMÆLI**
KT-nevnd fólkaskúlans - mars 1998

**Fólkaskúlalógin**

**Viðmerikingar til fólkaskúlalógina**

**Fólkaskúlin**
**Leiðbeinandi lesiætlan**
**Yrkisligur partur**

*Tilfar á internetinum:*

**Rugkobbelskolen i Aabenraa**
http://www.rugkobbelskolen.dk/
**Poseidon-projektet**

**Vester Hassing skole**
**Handleplan for IT**
http://www.vesterhassingskole.dk/ithandleplan.htm

**Herskindskolen**
**Ladingvej 16,  8464 Galten**
http://www.herskindskolen.dk/

**IT i undervisningen**
http://www.herskindskolen.dk/stifinder/iktundv.htm

**Herskindskolens IT-plan**
http://www.herskindskolen.dk/stifinder/itplan.htm

**Kærbyskolen**
**Oluf Borchsvej 2, 9000 Aalborg**
http://www.daks.dk/daks-web/skoler/kaer/index.htm

**Mål og handleplan for IT i undervisningen på Kærbyskolen**

**Parkskolen**
**Parkvej 76-2630 Taastrup**

**IKT i undervisningen - hvorfor, hvordan.**
**Arne Fjellerad 1999**